# um



*Fyrst og fremst so bar dysturin boð um, at skalt tú dystast við Skála ella B36, so skal venjingastøðan vera heilt í topp*

burturúr, so fingu teir eisini prógvað, hvussu týdningarmiklar tær sonevndur standard-støðurnar í modernaðum fótbólti eru. Í øllum førum kunnu nú bæði HB og B36 skriva undir uppá, at tað er mest sum lívshættisligt at geva Skála eitt innkast í nær námind brotsteiginum. Hetta fekk Pætur Dam Jacobsen, tá hann í aðru atløgu syfti bóltin sera neyvt inn í B36-málteigin. Í fyrstu atløgu var okkurt høvdu undir bóltinum, men tá hann datt fyri føturnar á Jónhard Frederiksberg, smekkaði arbeiðssami landsliðsmaðurin til fyrstu ferð. Og við eitt sindur av hepni, kundi sama støðan endurtikið seg seinni, men tað ferðina fekk Jónhard ikki fatur á leysa bóltinum, sum ístaðin varð skrumblaður út til horna.

## Úrslitið var helst rættvíst

Tí gjørdist talan enn einaferð um javnleik, og sum so ein hampuliga rættvísan av slagnum.

Mest av øllum, so bar dysturin boð um, at venjingarstøðan skal vera í lagi, um takast skal við antin Skála ella B36. Ferðin varð í løtum skrúvað væl upp um tað, sum spælararnir megnaðu at fylgja, nærdystirnir vóru nógvir og harðir - uttan at talan tó gjørdist um ljótt spæl, og yvirhøvur hevði kropsliga styrkin hjá liðunum báðum eitt stórt orð at siga.

Hjá Skála var javnleikurin kanska eisini ein staðfesting av, at teir enn eru væl og virðiliga við í oddastríðnum. Eitt pláss, sum annars var í vanda eftir tapið fyri VB á heimavølli. Men avrikið hesaferð bendi á, at talan tá bara var um einstakan svipsara.

Tað var eisini merkisvert, hvussu framrættað Skála spældi trupla útidystin. Í útgangsstøðnum var kanska talan um varisliga 4-5-1, har Bogi Gregersen var eins nógv miðvallari sum álopsspælari, men so skjótt liðið hevði vunnið bóltin, varð hetta umskipað til eina 4-3-3, har lopið varð á yvir báðar kantarnar, og har stórt trýst í fleiri førum varð lagt á mótstøðuna. Frískligt at síggja slíkt spæl á útivølli, og tað ber væl eisini boð um gott álopsspæl, um hugt verður at mótstøðuliðnum. Í øllum førum siga hagtølini hjá B36, at av teimum bara fimm málunum, sum liðið hevur latið ígjøgnum, hevur Skála staðið fyri teimum trimum.

Sjálvir hava teir í B36 ikki verið ídnastu málskjúttarnir, og ivaleyst iðraðu teir seg hesaferð um, at tað ikki eydnaðist at avgera dystin, meðan møguleikin var har.

Hinvegin máttu teir ásanna, at fótbóltur í dag snýr seg um annað og meira enn bara trýst. Eitt nú ræður um at gera sær dælt av mistøkum hjá mótstøðuni og av standard-støðum. Tað er annars eitt kynstur, sum B36 hevur dugað væl í ár, men sunnudagin vórðu teir revsaðir tvær ferðir av einum mótstøðuliði, sum dugdi hetta kynstur enn betri. Og so er hóast alt trupult at fáa meira enn bara annað stigið burturúr.

## Komu eftir øllum

Eitt stig í Gundadali móti B36 var helst til at liva við hjá Skála, og hetta viðgekk Jónhard Frederiksberg eisini eftir dystin sunnudagin.

- Vit fóru sjálvandi á vøllin eftir øllum, men soleiðis sum dysturin gekk, so mundi javnleikurin tó vera í lagi.

Men tit fáa eina dreymabyrjan. Gevur tað tykkum ikki betri fortreytir fyri at spæla tykkara spæl?

- Tað burdi tað gjørt. Og vit høvdu teir eisini fullkomuliga fyrsta korterið ella so. Men so detta vit ov langt aftur á vøllin. Og teir spæla sjálvandi eisini væl. Teir koma eisini bæði upp á javnt og framum, men tíbetur fáa vit strítt okkum aftur í dystin. Vit megna at javna, og tað er eisini um reppið, at vit eisini skora við eitt annað innkast frá Pæturi.

Eru hasi innkøstini nakað, sum tit hava vant serliga nógv?

- Nakað í øllum førum. Vit vita, at tað kann vera eitt gott vápn hjá okkum, so sjálvandi gera vit tað, heldur Jónhard.

### Revansju móti VB

Komandi umfarið skal Skála á heimavølli taka ímóti VB, og tað er ein dystur, sum Jónhard so púrasta víst ætlar sær at vinna.

- Tað er einki at tosa um. Á heimavølli móti einum av niðaru liðunum skulu vit vinna. Teir hava eisini longu snýtt okkum einaferð í ár, so vit halda okkum avgjørt hava revansju til góðar. Fyrra dystin móti teimum mistu vit í øllum førum stig, sum vildu komu væl við nú, og tað skal so ikki henda aftur.

**-jm**



*– Vit fóru sjálvandi á vøllin eftir øllum, men soleiðis sum dysturin gekk, so mundi javnleikurin tó vera í lagi, helt Jónhard Frederiksberg*